Fylgiskjal 14

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Heilsu- og innlendismálaráðið
HilmarHøgenni
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting: **14. september 2018**
Tygara ref.:
Máltal.: **18/00362-7**

**Viðv. uppskotum til broytingar í løgtingslógum um náttúrufriðing, kærunevnd í lendismálum og umhvørvisvernd**

Náttúrufriðingarlógin, sum náttúrumargfeldislógin ætlandi skal avloysa, er áhugamál hjá Mentamálaráðnum, tí Tjóðsavnið umboðar fakliga serkunnleikan innan mentanarminni og náttúru í Yvirfriðingarnevndini. Mentamálaráðið var tí fegið um at verða umboðað í tí arbeiðsbólki, sum landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum í mars 2017 setti at orða uppskot til nýggja føroyska náttúruverndarlóg. Sum áður fráboðað verður tikið undir við, at nágreiniligari lógarkarmar verða settir fyri, hvussu sitið verður fyri náttúruni í Føroyum.

Í sambandi við uppskotið um náttúrumargfeldislóg viðmerkti Tjóðsavnið, at náttúrumargfeldislógin og ein nýggj fornminnalóg áttu at komið í gildi samstundis, tí talan er um myndugleikaøki, sum í summum førum umskarast, eitt nú tá talan er um tað, sum í uppskotinum um náttúrumargfeldi verður nevnt røktarlandsløg og landslagsverndarøki. Tí varð eisini viðmerkt, at nýggja náttúrumargfeldislógin eigur at vísa til fornminnalóggávuna og fornminnamyndugleikan, og at ein nýggj fornminnalóg eigur at vísa til náttúrumargfeldislógina og myndugleikan á økinum.

**Til 1. Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing**

Í sambandi við avtøku av Yvirfriðingarnevndini verður víst á, at tað er av alstórum týdningi, at tann fakligi serkunnleiki, ið hevur verið umboðaður av Tjóðsavninum í Yvirfriðingarnevndini, verður nøktandi umboðaður í nýggju lóggávuni og fyrisitingini á økinum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður greitt frá, at Yvirfriðingarnevndin hevur kostað umleið kr. 500.000 árliga, men at neyðugt er at uppbyggja eina fakkøna náttúrufyrisiting at sita fyri náttúrumargfeldislógini. Mælt verður í fyrstu syftu til at luta Umhvørvisstovuni í minsta lagi trý akademisk størv til at taka sær av fyrisitingini av náttúrumargfeldislógini umframt náttúruskráseting, men at tørvurin við tíðini, so hvørt tey ymsu amboðini í lógini fara at verða brúkt, verður størri.

Ført hevur verið fram, at dupultfunktiónir ikki eiga at verða uppbygdar í almennu umsitingini, og trupult er at síggja, hvussu Umhvørvisstovan skal fáa til vega fakliga serkunnleikan á økinum, uttan í stóran mun at seta fólk í starv við serkunnleika og uppbyggja vitan á økjum, ið Tjóðsavnið, og í einstøkum føri Jarðfeingi, longu varða av.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Sambært galdandi lóg um Føroya Náttúrugripasavn (Tjóðsavnið), er tað uppgávan hjá savninum at savna, varðveita og framsýna náttúrugripir, sum lýsa náttúru landsins og at savna, varðveita og handfara náttúruvísindaligt tilfar. Fyri at fáa samanhang og synergi millum ta vitan um náttúruna sum longu er savnað og sum áhaldandi verður savnað á Tjóðsavninum, og nýggju vitanina, ið verður savnað í sambandi við fyrisiting av náttúrumargfeldislógini, so kundi fyrisitingin av viðkomandi pørtum av náttúrumargfeldislógini verið løgd til Tjóðsavnið.

Mentamálaráðið vil mæla til, at Yvirfriðingarnevndin ikki verður tikin av, fyrr enn fornminnalóggávan er dagførd. Hetta er, sum áður nevnt, neyðugt fyri at sambandið, sum í Yvirfriðingarnevndini hevur verið millum fyrisiting av náttúru og fornminnum, verður varðveitt.

Nevnast kann, at Mentamálaráðið hevur arbeitt við dagføring av lóggávuni á fornminnaøkinum, og at ætlanin er at taka arbeiðið upp aftur sum skjótast.

**Til 2. uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum**

Tað er umráðandi, at kærunevndin í náttúru-, umhvørvis- og lendismálum hevur atgongd til røttu serfrøðina í viðgerð av einstøku kærunum. Á náttúruøkinum er tað tó ikki gjørligt hjá einum fólki at vera serfrøðingur innan alt økið, og mælt verður tí til, at ein skipan, ið líkist henni hjá Vinnukærunevndini, sum er mannað við formanni ella næstformanni og tveimum til fýra limum við serkunnleika á viðkomandi øki, verður sett í staðin.

Hildið verður, at orðingin "náttúrukønur" er ov ógreið, og mælt verður til at brúka heitið náttúrufakligur serkunnleiki í staðin.

**Til 3. Uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd**

Ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Poul Geert Hansen
*aðalstjóri*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo